# Reglugerð

## útflýggjan av føroyskum dýpdardátum

Henda reglugerð fevnir um útflýgging av dýpdardátum í føroyskum sjóøki, heimilað í samsvari við galdandi lógarverki.

**Útgivin fyrstu fer: 30.10.25 - Útgáva nr. 1**

umhvørvisstovan

FAROESE ENVIRONMENT AGENCY



# Reglugerð um útflýgging av føroyskum dýpdardátum

## Endamál og galdandi øki

Umhvørvisstovan er sjókortmyndugleiki og umsitur dýpdardáturnar í føroyskum sjóøki. Henda reglugerð fevnir um útflýgging av dýpdardátum í føroyskum sjóøki, heimilað í samsvari við galdandi lógarverk, kap. 7, §§ 12-14 (*Anordning nr. 189 af 12. februar 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om stedbestemt information*).

Dýpdardátur fevna bæði um uppruna og viðgjørdar mátingar av havbotnsdýpinum.

Dýpdardátur við hægri tættleika enn 50 x 50 metrar vera flokkaðar sum avmarkaðar og eru ikki alment atkomuligar. Dýpdardátur tættari enn 50 x 50 metrar skulu trygdargóðkennast av danska verjumálaráðnum áðrenn tær verða útflýggjaðar. Tískil krevst ein umsókn, ið lýkur ávísar treytir:

1) eitt nágreiniligt endamál,

2) at víddin á økinum er landafrøðiliga lýst og í samsvari við endamálið,

3) ein frágreiðing um hví tær alment tøku dáturnar ikki nøkta tørvin, og

4) ein lýsing av hvussu dáturnar verða handfarnar og varðveittar.

Reglugerðin verður javnan endurskoðað fyri at tryggja, at hon er í samsvari við galdandi lóggávu, trygdarfyrilit og tøknilig framstig.

## Krøv til umsøkjaran

Umsøkjarin skal veita grundupplýsingar um seg sjálvan og stovnin ella fyritøkuna, ið hann umboðar. Harumframt skal umsøkjarin vátta, at dátur verða handfarnar ábyrgdarfult og í trúnaði.

## Dátusnið og -góðska

Dátur verða vanliga útflýggjaðar sum dátunet, t.v.s. eitt dátusnið við regluligari frástøðu millum hvørt dátupunkt.

Dáturnar stava frá ymiskum keldum, ymiskum mátiháttum, eru ymiskar í aldri, og tískil ymiskar í góðsku. Umhvørvisstovan hevur ikki ábyrgd av góðskuni og veitir onga trygd fyri neyvleika ella lýtaloysi dátanna. Umhvørvisstovan hevur onga ábyrgd av hvørki innihaldi, uppruna, villum, manglum ella møguligum skaðum, ið standast av nýtsluni av dátunum.

## Handfaring av upphavsrætti

Útflýgging av uppruna dátum krevur loyvi frá dátueigarunum. Umhvørvisstovan skipar fyri at avtala verður gjørd við dátueigarar, um tørvur er á tí.

## Kostnaður

Avgreiðslugjald, við støði í arbeiðstíð, verður tikið fyri at tilevna og útflýggja dátur til umsøkjaran, á kr. 900 DKK fyri hvønn byrjaða tíma. Umhvørvisstovan skal ikki rindast fyri sjálvar dáturnar. Tó kann annar dátueigari krevja gjald fyri upprunadátur. Í slíkum førum rindar umsøkjarin fyri umbidnu dátur til dátueigaran.
Um umsóknin ikki verður góðkend, verður einki ómaksgjald kravt.

## Treytir fyri nýtslu og varðveitslu

Útflýggjaðu dáturnar skulu handfarast og varðveitast á tryggan hátt.

Dáturnar skulu einans nýtast til lýsta endamál. Við ætlan um at nýta dáturnar til eitt nýtt endamál skal nýggj umsókn sendast til Umhvørvisstovuna.

Dáturnar verða lætnar í trúnaði og kunnu ikki gerast alment atkomuligar uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni.

Dátur kunnu ikki latast ella seljast víðari.

Dáturnar mugu ikki nýtast á ein hátt, so tað kann tykjast, at myndugleikin góðtekur, stuðlar, viðmælir ella marknaðarførir brúkaran, framleiðslu ella tænastu hjá brúkaranum. Tryggjast skal, at nýtslan er í samsvari við lóggávuna og góðan keldutilvísingarsið.

Dáturnar mugu ikki brúkast at sigla eftir.

Umhvørvisstovan skal viðurkennast har ið tað hóskar, tá ið úrslit verða kunngjørd frá viðgerð av útflýggjaðu dýpdardátunum.